# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Nú havi eg spælt í Føroyum í fýra ár, og tí havi eg vant meg við veðurlagið her. Í dag var tað næstan, sum spældi eg aftur í Serbia*

*Nenad Stankovic, NSÍ*

## Gloymdu at sløkkja mikrofonirnar

**Tað hevur skapt stóra øsing, at frásøgumaðurin hjá SkySports sendi nøkur minni heppin orð í luftina, tá hann umrøddi dystin millum Føroyar og Skotland, og helt at mikrofonirnar vóru sløktar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Richard Keys hevur í drúgt áramál verið eitt tað best umtókta andlitið á skíggjanum hjá SkySports*

- Daft little ground, silly game. Fuck off.

Soleiðis ljóðaðu seinastu orðini frá frásøgumanninum hjá SkySports, Richard Keys, tá teir vóru lidnir at senda frá dystinum á Svangaskarði millum Føroyar og Skotland.

Sjálvur helt Keys, at mikrofonirnar vóru sløktar, tá orðini fóru í luftina, men prátið millum hann og Jamie Redknapp, sum eisini var við til varpingina.

Leiðslan í SkySports var alt fyri eitt úti við eini treytaleysari umbering fyri hendingina.

- Talan var um eitt tekniskt mistak, sum bar við sær, at off-air viðmerkingar av óvart komu við. Ein og hvør, sum hevur hoyrt okkara umrøðu av dystinum, er ikki í iva um, at vit fult og heilt stuðla skotska liðnum. Viðmerkingar komu at enda í eini seks tíma langari frásøgn, og vit vilja sjálvandi geva eina treytaleysa umbering til allar hyggjarar, sum tóku sær tikni av hesum, segði ein talsmaður fyri SkySports.

Klippið við orðunum hjá Keys er sjálvandi at finna á netinum, og er slóðin her http://www.whoateallthepies.tv/2007/06/skys_richard_ke.html

Hendingin minnir ikki sørt um hana, sum fyri fáum árum síðani kostaði Ron Atkonson starvið sum fótbóltsviðmerkjara. Hetta tá hann tosaði niðrandi um Chelsea spælaran, Marcel Desailly, tá Big Ron annars helt, at mikrofonirnar vóru sløkar.

Richard Keys missir tó ikki starvið, verður sagt á SkySports. Sum føroyingar kunnu vit so bara ímynda okkum, hvussu orðini høvdu ljóðað, um okkara menn sendu onkrar av møguleikunum í dystinum í kassan.

## Ein føroyingur afturat í superliguni



**Sunnudagin tryggjaði Lyngby sær uppflyting í superliguna, meðan Fremad Amager tapti og er illa statt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var stórur fagnaður í Lyngby tíðliga seinnapartin. Við sannførandi 4-0 sigri á grannunum úr Bagsværd, sum spæla í AB, tryggjaði Lyngby sær sess í superliguni næsta kappingarár. Harvið er tað greitt, at enn ein føroyskur landsliðsspælari verður í superliguni.

Christian Lamhauge Holst var millum teir fyrstu ellivu á Lyngby liðnum, og hann verður eisini í Lyngby næsta kappingarár.

Lyngby fór á húsagang stutt fyri jól í 2001. Tá varð liðið flutt úr bestu deildini og niður í Danmarksseriuna, men nú hevur Lyngby aftur tryggjað sær pláss í deildini, har teir halda seg hoyra heima.

Hjá Fremad Amager, Toda Jónsson, Jónas Þór Næs, Tem Hansen og Andrew av Fløtum gongur tað minni væl. Jónas varð skiftur inn, og Tem varð skiftur út. Todi og Andrew spældu alla tíðina, og Andrew javnaði til 2-2, tá ið tað restaðu átta minuttir. Í yvirtíðini skoraði Aarhus Fremad sigursmálið til 3-2 í Sundby Idrætspark.

Fremad Amager er næstaftast. Harvið er støðan hættislig, men enn er møguleiki fyri at bjarga plássinum í næstbestu deildini.

## Popczynski eigur fult álit í HB

**Tað er eingin ætlan í meistaraliðnum at siga venjaran úr starvi, eftir at liðið aftur hesa ferð heilkiksaði**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

HB hevur tað ikki gott. Tað varð enn eina ferð staðfest sunnudagin. Venjarin sigur inni á ítróttarsíðunum, at tað hevur verið púa vónleyst at venja og fyrireika seg til ferðina suður til Sands. Mest sum allir spælararnir hava verið upptiknir av alandsliðnum og U-21 landsliðnum. Tað hevur darvað venjingarnar.

HB hevur tapt fýra ferðir í ár – tvær ferðir ímóti GÍ og tvær ferðir ímóti B71. Tað vil við øðrum orðum siga, at øll tapini hava verið ímóti feløgum, sum spæla í gulum troyggjum og bláum buksum. Á B71 heimasíðuni vilja tey vera við, at HB hevur fingið gulsótt!

### Einki tema

Higartil eru fýra av tíggju venjarum í Formula deildini farnir úr starvi. Venjararnir hjá KÍ, AB og VB/Sumba eru sagdir úr starvi, og B71 venjarin segði seg úr starvi. Enn hevur B71 ikki sett nýggjan venjara. Eli Hentze tekur sær av venjingunum og taktikkinum, og tað tykist ganga sum eftir ánni.

HB plagar at vinna nógv og ofta. Tí er tað ikki at undrast á, at tað ikki bara er farið aftur við borðinum, at HB hevur tapt fýra ferðir, nú kappingin ikki er hálvrunnin.

Tosið um at skifta venjara hevur verið at hoyrt, men tað er ikki eitt tema millum tey, sum hava ábyrgd í meistarafelagnum.

- Beint nú iðri eg meg mest um, at vit ikki fingu minkað munin til oddin niður í tvey stig. Soleiðis sum úrslitini lagaðu seg, so kostaði tað í grundini einki, at vit taptu, men tað ger hinvegin iðranina um mista møguleikan enn størri.

- Men spyrt tú um venjaran, so er hetta als ikki nakað, sum vit hava viðgjørt. Vithavaeintýdningarmiklan dyst nú mikukvøldið, tá vit spæla hálvfinalu í steypakappingini. Og vit vilja altso heldur nýta orkuna til hetta, heldur enn at tosa um uppsagnir og venjaraspurningin.

- Mann fyri mann hava vit eisini ein framúr góðan spælarahóp, men enn hava avrikini tíverri ikki verið nóg støðug. Við fimm stigum upp til oddasessin er tó langt ífrá víst, at vit eru úti úr oddastríðnum. Higartil hava fingið sjey av níggju stigum móti teimum trimum, sum eru oman fyri okkum, og megna vit at halda fast um ta gongdina, samstundis sum vit byrja at vinna hinar dystirnar, so sær nú ikki heilt galið út, sigur Steinfinnur Mittelstein.

## Eitt stig til Símun

**Á Laugardalsvøllinum var Keflavík frammanfyri við tveimum málum, áðrenn Valur javnaði til 2-2**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast hann hevði verið burturstaddur í meiri enn eina viku í sambandi við landsdystirnar ímóti Italia og Skotlandi, so var Símun Samuelsen ímillum teir fyrstu ellivu, tá ið Keflavík í gjár spældi landskappingardyst á Laugardalsvøllinum í Reykjavík.

Mótstøðuliðið var sigursvanda Valur. Í 1. hálvleiki gekk sum eftir ánni hjá Keflavík, sum legði seg á odda eftir fimm minuttir og í 31. minutti økti til 2-0. Eftir ein lítlan tíma minkaðu teir um munin, og tveir minuttir fyri leiklok javnaðu teir til 2-0. Víkingur og Breiðablik spældu hóskvøldið 1-1. Hinir dystirnir í 5. umfari eru á skránni í kvøld.

Valur hevur 9 stig og Keflavík hevur 8 stig eftir fimm umfør. Fleirfaldu meistararnir í FH eru oddalið við tólv stigum fyri fýra dystir. Valur og Keflavík eru undan úrslitunum í kvøld á øðrum og triðja plássi.